## DAGSINS MEINING

# Menningarhjálp og handilssamband

Tað er gleðiligt, at Løgmaður nú setur menningarhjálpina á dagsskrá. Føroyingar hava latið menningarhjálp í nógv ár, men vit hava í høvuðsheitinum latið hana ígjøgnum útlendskar felagsskapir, tað vil sig, at vit oftast ikki sjálv eru komin í samband við endamóttakaran.

Løgtingið skal nú umrøða, hvussu menningarhjálp skal latast. Sum orðið menningarhjálp sigur, so eiga vit at leggja dentin á at menna ein førleika í móttakaralandinum. Um vit skulu menna ein førleika, so mugu vit finna eitt øki, har vit føroyingar duga betur enn móttakarin.

Nú er upphæddin, sum vit í løtuni lata ikki høg nokk til at spreiða okkum yvir ov nógv øki, men tað er rætt, sum Høgni Hoydal førdi fram í kjaki herfyri, at man kanska eisini burdi satsað uppá undirvísing og heilsuverk, um vit, væl at merkja, halda, at vit duga nóg væl á hesum økjum.

Tað, sum Føroya Landsstýri hevur í umbúnað í Peru, tykist verða ein skilagóð ætlan. Talan er um eitt samstarv innan øki, har vit hava nakað at geva. Tað er týdningarmikið, at tann relativt lítla upphædd, vit lata í løtuni, verður brúkt á ein fokuseraðan hátt. Vit kunnu altíð víðka menningarhjálp til útbúgving o.s.fr., men tá eiga tinglimir at fáa at vita, at pengarnir mugu fylgja við.

Tað hevur verið framstillað í fjølmiðlum og millum politikarar sum nakað ivasamt, at vinnufyritøkur kunnu fáa nakað burtur úr menningarhjálp. Tað er einki odiøst í hesum. Menningarhjálp er hjálp til menning og ikki neyðhjálp. Talan eigur at verða um projekt, sum leggja nakað varandi eftir seg í móttakaralandinum. Ein og hvør partur í einari sovorðnari ætlan fær nakað burturúr. Ein føroysk fyritøka, sum er við í einum menningarprojekti fær kunnleika um tað at arbeiða í menningarlondum. Hetta hava føroyskar fyritøkur longu sum er royndir av, í sambandi við at tær hava luttikið í Danida projektum í eitt nú Afrika. Eitt, við nøkrum fáum undantøkum, innatlítandi vinnulív sum tað føroyska hevur bara gott av at luttaka í menningarhjálp. Hesar fyritøkur mugu sjálvandi betalast fyri sítt arbeiði, tí fólk mugu fáa løn, og er tað her tað almenna skal skipa fyri. Fáa hesar fyritøkur so aftaná handilssamband til móttakaralandið og øvugt, so hava øll vunnið.

Tað er púra misskilt, at menningarhjálp endiliga ikki má geva gevaranum nakað. So leingi móttakariin fær tað, hann skal, so er tað bara ein eykavinningur, at gevarin eisini fært nakað burturúr, Tað er beinleiðis fordummandi at føra fram, at menningarhjálp endiliga ikki má føra til handilssamband millum móttakara og gevara. Handilssamband er neyðugt fyri øll lond – eisini menningarlond. Føroyingar handla sum er við Nigeria, og tað er ein grov undirmeting av menningarlondum, ið bert byggir á óvitinheit, tá man gongur út frá, at tað ikki tænir móttakaralandsins áhugamálum at hava handilssamband við so nógv lond sum møguligt. Men hvussu og ikki, so er tað bæði gott og sunt, at vit fáa eitt aðalorðaskifti um slikt mál.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Royktám um skattalætta

**Jógvan Arge**
*Varaborgarstjóri í Havn*



Nú royna minnilutafólk í Tórshavnar býráð at kasta býráðssamgonguni fyri, at hon hevur tikið ein fyrigyklaðan skattalætta hjá landinum frá fólki. Soleiðis hongur hetta als ikki saman.

Tað hevur verið ein greið støða millum landið og kommunurnar, at fyri tað, sum landið slapp undan av útreiðslum orsakað av, at barnaverndarøkið verður lagt út á kommunurnar, skuldi landið lækka sín skatt, og kommunurnar skuldu taka hesar somu pengar inn aftur í kommunuskatti.

Kommunusamskipan Føroya hevur eina greiða semju við landsstýrismannin í fíggjarmálum um, at tað, sum landið nú á nýggjárinum flytir yvir á kommununar av útreiðslum, svarar til umleið eitt skattaprosent.

Meirilutin í Tórshavnar kommunu virðir hesa meting og avtalu og hevur hækkað skattaprosentið samsvarandi hesum. Tað svarar til tær útreiðslur, sum vit fáa meir í okkara part, og sum landið skuldi spart.

Men landið hevur eftir øllum at døma ikki ætlanir um at lækka landsskattin samsvarandi tí, sum tað sleppur undan. Hetta sæst á teimum tølum, sum eru sett upp fyri almannaøkið á komandi fíggjarlóg.

Har er lítil ella ongin útreiðsluløkkking at hóma, hóast landið sleppur av við einar 70 mió í útreiðslum, sum kommunurnar taka upp á seg. Tá er ikki ringt at gita, hvar hundurin er grivin, tí skattajavningin millum landið og kommunurnar skuldi vera neutral.

Tað er hon ikki, tá landið ikki minkar sínar útreiðslur samsvarandi teimum útreiðslum, sum landið sleppur at kasta av sær. Sostatt er tað landið, sum heldur uppi einum hægri skattatrýsti.

Takkað verið hentum sprellimonnum sum minnilutanum í Havn, verður roynt at billa fólki inn, at skurkarnir sita á Vaglinum. Men tað gera teir ikki. Teir sita í Tinganesi.

Oddvitarnir í minnilutanum blanda helst eisini landspolitisk atlit upp í kommunupolitikkin, tá teir krevja, at kommunan umvegis skal útvega ein skattalætta, sum landið hevur lovað.

Hetta krav verður ikki eftirlíkað. Kommunurnar mugu og skulu hava krónur afturfyri tað, sum tær taka upp á seg frá landinum. Landið má sjálvt finna útvegir fyri sínum skattalætta og ikki brúka somu pengar til bæði skattajavning millum land og kommunur og skattalætta til fólkið.

Tað er ikki annað enn at blása og hava mjøl í munninum samstundis.

Okkum er púra greitt, at í longdini bera kommunurnar ikki boð í bý, um tær skula halda fram at átaka sær málsøkir hjá landinum við øllum útreiðslum - uttan at fáa veruliga fíggjarliga kompensatión.

Tí handla vit, meðan væl er.

# Heimahjálp

**Sigvald Kristiansen**



Endamálið við heimahjálpini var at veita stuðul heima til tey, sum ikki orkaðu ella ikki vóru før fyri at klára síni egnu viðurskifti í egnum húsi, so at tey – sum tey flestu ynskja – kundu vera búgvandi heima undir sømiligum viðurskiftum. Hóast hesa hjálp, so eru tað kortini út ímóti 10% av øllum pensjónistum, sum eru so illa fyri, at tey noyðast at fáa meira umsorgan og hjálp á einum sambýli ella røktarheimi, og tíbetur eru tað komin fleiri tílík pláss tey seinnu árini, kommunum og landsmyndugleikum fyri at takka.

Størsti parturin av fólkapensjónistum eru tíbetur so væl fyri, at hesi klára seg sjálvi við góðari hjálp frá familju og avvarðandi í teirra egna heimi. Í Árbók fyri Føroyar 2004 stendur, at tað eru 5.516 fólkapensjónistar, og í árbókini fyri 2003 stendur, at tað eru 1.144 fólk, sum fáa heimahjálp, tað vil siga umleið 20% av pensjónistum fáa heimahjálp.

Fólk søkja ikki um heimahjálp, fyrr enn tey hava brúk fyri henni. Eg havi dømi um, at bæði 85 ára gomul og enntá 90 ára gomul, sum hava søkt heimahjálp fyri fyrstu ferð, hava fingið avslag, tí eingir pengar eru til. Kunnu vit bjóða okkara allar elstu tílíkt?

Og nú verður biðið um fleiri pengar til umsiting av Heimarøktini! Landsfelag Pensjónista hevur í áravís víst á, at tað er neyðugt við fleiri pengum til Heimahjálpina, til hjálp í heimunum, so tey gomlu kunnu vera longri í teirra egna búðstaði og umhvørvi.

Í somu árbók fyri 2004 sæst, at í 1999 fekk Heimarøktin 67.693 mill. kr., í 2003 106.044 mill. kr., eg havi ikki talið fyri 2004, tað er ivaleyst upp aftur hægri, men hetta er so ein vøkstur uppá umleið 40 mill. kr. uppá 4 ár til Heimarøktina, men Heimahjálpin er skerd øll hesi árini, har tíðin til tann einstaka brúkaran er stytt, og heimahjálparar eru uppsagdir, og nú í 2005 fáa 85 og 90 ára gomul avslag uppá heimahjálp!

Trivnaðarnevndin er á beinari leið, tá hon mælir til ikki at hækka pening til umsiting, men heldur lata hendan pening koma brúkaranum til góða, tað er uppá tíðina. Hvussu leingi skal ein 85 ára gamal og ein 90 ára gamal bíða eftir at fáa síni sjálvsøgdu rættindi? Vit siga okkum vera eitt vælferðar samfelag, lat tað verða víst í verki.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.